# Bilasølan stendur framvegis í stað

Hagtølini hjá Akstovuni vísa, at sølan av nýggjum persónbilum stendur so at siga í stað í mun til fýra teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Nú fýra teir fyrstu mánaðirnir eru farnir av 2011, vísa hagtølini hjá Akstovuni at í ár vórðu seldir 246 persónbilar í mun til 242 í fjør. Sølan av vørubilum er vaksin við 36 prosentum frá 22 til 30 bilar. Samlaði vøksturin av nýggjum akførum er 5,2 prosent.

**Hagtøl um skráseting av nýggjum akførum fyri Jan-Apr 2011 og 2010**

| Akfaraslag | Apr 2011 | Apr 2010 | Broyting Apr 11/10 | Jan-Apr 2011 | Jan-Apr 2010 | broyting 11/10 | %broyting 11/10 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Bussar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Kampingvognur | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 | 3 | ódef.% |
| Hýrubilar | 0 | 2 | -2 | 7 | 6 | 1 | 16,67% |
| Lastbilar | 0 | 2 | -2 | 3 | 2 | 1 | 50,00.% |
| Leguvognar | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | ódef.% |
| Líkvognur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Motorsúkkla | 1 | 2 | -1 | 1 | 5 | -4 | -80,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Persónbilar | 79 | 73 | 6 | 246 | 242 | 4 | 1,65% |
| Prutl | 5 | 4 | 1 | 31 | 23 | 8 | 34,78% |
| Pylsuvognur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Smábussar | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Viðfestivognar | 6 | 6 | 0 | 20 | 21 | -1 | -4,76% |
| Vøruvognar | 7 | 5 | 2 | 30 | 22 | 8 | 36,36% |
| Kampingbilur | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Sópimaskina | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,00% |
| Traktorar | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Samlað | 98 | 94 | 4 | 342 | 325 | 17 | 5,23% |

# Betri umstøður til arbeiðarafelag

Vestmanna: Hesa seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at bøta um húsini hjá Vestmanna Arbeiðarafelagi.

Tað eru menn hjá teimum báðum timburmeistarunum, Jákup Hendrik Egholm og Sigbjørn Skúvadal sum nú seta hesi húsini í stand, samstundis sum ein skipar húsini so, at tær báðar hæddirnar í bygninginum koma at fylgjast, sum um talan var um eina einstaka lon.

Sum myndin hjá Birgir Waag Høgnesen vísir standa húsini, har skeinkistaðið Bryggjan heldur til, og sum arbeiðarfelagið eisini eigur.

Arbeiðið byrjaði fyrr í vár, men hava teir verið nakað seinkaðir orsakað av vánaliga veðrinum henda farna mánaðin.

*snorri@sosialurin.fo*



# Samanlegging í Vestmanna



*Mynd: Hildbert Elisson*

**HANDIL** Tað er ikki á hvørjum degi, at samanleggingar fara fram úti á bygd, men í Vestmanna húsast handlarnir, Freya og Romantiqe, nú undir somu lon.

**Birgir Waag Høgensen**

Freya og Romantiq eru nú tveir handlar undir somu lond í Vestmanna. Mótahandilin, sum Tórhild Nielsen eigur og handlin hjá Kirstin Johannesen, sum selur lekrar lutir til heimið og nógvum gávuhugskotum.

Tær báðar hava sæð møguleikarnar við felags rakstri og hava nú flutt handlarnar saman í hølini, har Posta áður helt til. Áður helt Roamtiq til uppi í bygdini og Freya niðri á Bakka tey kalla.

Leygardain lótu tær báðar sínar handlar upp. Handlarnir liggja beint við Eik og BankNordic Kristin og Tórhild lata væl at, tí heilt fitt av avbygdafólki vóru og vitjaðu henda góðveðurdagin í Vestmanna.



# – Helgi Fossádal verið ein knassi

**LISTASAVN** Fríggjadagin fór Helgi Fossádal frá sum stjóri á Føroya Listasavni. Stór mannfjøld var møtt upp at heiðra og takka honum, samstundis sum tey ynsktu honum alt tað besta í framtíðini.

Martin Næs legði út við tøkk og skemtandi hugleiðingum um samstarv teirra, og at Helgi Fossádal hevði staðið sum ein brandur hóast ofta órættvíst mótrák.

Og honum á baki Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, Malan Marnersdóttir, forkvinna í Føroya Listafelag, Heðin Mortensen, borgastjóri og Ole Wick, formaður í Myndlistafelagnum, bóru á sama borðið og høvdu somu tøkk at bera Helga fyri dugnasemi og ágrýtni, og at tað var at undrast á allar tær listabøkur, hann hevði loyst úr lagdi.

Og í dag kom so »høvuðsverkið« út - Sekel, um føroyska list í 100 ár, sum Mikael Wivel hevur skrivað.

Mikael Wivel loysti rættiliga frá posabandinum í røðu síni og setti at teimum, sum høvdu dittað sær til at seta spurnartekin við megnarverkið hjá Helga Fossadal sum stjóri á Listasavni Føroya. Tað var fáur, sum hevði kunnað gjørt honum tað eftir, óansæð hvørja útbúgving og royndir hesi høvdu.

Við allari virðing fyri nýggja stjóranum, Niels Ohrt, sum Mikael Wivel ynskti góða eydnu í stavinum, hann byrjar komandi mánadag, so kemur hann til ein væl riknan stovn, og hann skal renna skjótt fyri at vera líka raksur, sum Helgi Fossadal, helt hann fyri.

Lesið røðuna hjá Mikael Wivel á síðu 30-31.

**Dávur Winther**